# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Útbrend starvsfólk á Landsjúkrahúsinum

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevði í gjár fund við álitisumboð á Landssjúkrahúsinum um vánaligu arbeiðsumstøðurnar á stovninum. Niðurstøðan var, at felagið og álitisumboðini harðliga mótmæla teir karmar og tær arbeiðsumstøður, sum sjúkrarøktarfrøðingarnar á ávísum deildum á Landssjúkrahúsinum arbeiða undir**



*Tey føstu starvsfólkini vilja hava, at eisini tey kunnu fáa boðið at fáa meira enn minimumsløn, tá tær taka eyka vaktir, og at hesin peningur ikki bert fer til vikarar frá útlandinum*

## YVIRLÝSING

Í yvirlýsingini, sum varð send fjølmiðlunum eftir fundin, stendur millum annað.

Deildirnar eru ikki mannaðar nóg væl, tá hugsað verður um røktartyngd. Tað hevur verið økt arbeiðsbyrða í longri tíð, og fleiri sjúkrarøktarfrøðingar siga seg nú koyra uppá síðstu orkuna.

Felagið krevur, at arbeiðsorkan kemur at samsvara við arbeiðsbyrðuna. Hetta kann m.a. gerast við at seta fleiri starvsfólk, ella um tað ikki letur seg gera at minka seingjartalið á deildunum.

Fleiri sjúkrarøktarfrøðingar eru farnir úr starvi yvir longri tíð, og fáar ella ongar umsóknir eru til tey størv, sum verða lýst leys. Landssjúkahúsið hevur við hesum mist starvsfólk við nógvari vitan og royndum, og tað er ein stórur vandi fyri, at hesin trupulleikin bert økist munandi, um ikki nakað verður gjørt nú.

Leiðslan má gera okkurt fyri at fáa síni starvsfólk at verða verandi. Álitisumboðini vilja hava leiðsluna at røkta starvsfólkini, sum tey hava. Tey føstu starvsfólkini vilja hava, at eisini tey kunnu fáa boðið at fáa meira enn minimumsløn, tá tær taka eyka vaktir, og at hesin peningur ikki bert fer til vikarar frá útlandinum. Leiðslan hevur í longri tíð nýtt nógvan pening uppá at loysa her og nú trupulleikar og ikki uppá langtíðarloysnir.

Álitisumboðini bjóða seg fram at saman við leiðsluni at koma fram til munadyggar loysnir. Samstundis vilja vit heita á landsins politikarar um at vísa ábyrgd fyri støðuni á Landssjúkrahúsinum.

-dh-

temp-team
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM

Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**
TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**

# Kunnandi fundur um samanlegging í Vágum

**Í annaðkvøld verður kunnandi fundur á Giljanesi um at leggja Miðvág og Sandavág saman í eina kommunu**

Bygdaráðini í Miðvági og Sandavági samtyktu í heyst at hava vegleiðandi fólkaatkvøðu í báðum bygdunum um at leggja tær saman í eina kommunu

Fólkaatvøðan verður leygardagin 19. januar, samstundis sum løgtingsvalið.

Í hesum sambandi verður almennur kunningarfundur í annaðkvøld, hóskvøldið, klokkan 20 í auluni á skúlanum á Giljanesi

Á fundinum fara fólk at greiða frá løggávuni, umframt at fólk eisini fara at greiða frá, hví tey eru fyri ella ímóti kommunusamanlegging.

Bygdarráðslimir verða eisini til staðar og tað verður eisini høvi hjá fundarfólki at seta spurningar.

Fyribils hava tey fingið Eyðun Christiansen, ráðgevara hjá Føroya Kommunufelag, at greiða frá løggávuni á økinum. Hans Mourits Foldbo, borgarstjóri í Gøtu, fer at greiða frá, hví hann er fyri samanlegging. Somuleiðis fer Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði, at greiða frá sínari støðu til kommunusamanlegging

-áki-

Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki at koyra á vaktarleiðum okkara í Klaksvík og Eysturoy.
Rein revsiváttan og koyrikort er ein treyt.
Nærri fæst at vita hjá vaktleiðaranum tlf. 50 50 60 ella stjóranum tlf 50 50 61.

ANSNI
TRYGDARFELAG

POSTBOKS 2032 • 165 ARGIR
TELEFON 505050 / 505061
WWW.ANSNI.FO

# Kvinnur í Suðuroy fylkjast í felag

**Í næstum fara kvinnur í Suðuroy at stovna felag at skipa fyri stórum og smáum tiltøkum**

Tá ið Demokratia í november mánaði í fjør, var í Øravík og kunnaði um kvinnur í politikki, bleiv kjakið somikið áhugavert, at kvinnurnar, ið vóru komnar saman tað kvøldið, avgjørdu at hittast aftur. Tað er nú endað við, at tað er gjørt av at stovna felag fyri kvinnur í Suðuroy.

Fyribils hevur felagið fingið navnið Valkyrjurnar og ætlanin er, at tær skulu skipa fyri smáum og stórum tiltøkum í oynni, eitt nú fyrilestrum um ymisk áhugaverd evni, hugnakvøldum ella kjakkvøld um politisk og samfelagslig evni, ella um onnur evni.

Í hesum sambandi er væl hugsandi, at tær fara at skipa fyri valkafé, nú valstríðið uppundir løgtingsvalið er byrjað og at tær eisini fara at skipa fyri tiltak á altjóða kvinnudegnum 8. mars.

Navnið Valkyrjurnar er tikið úr norrønu gudalæruni, har valkyrjan er kvinnuliga mótstykkið til einherjan. Valkyrjurnar eru kvinnuligar verur, sendar av Óðini, í vøkrum kjóla, við brynju og spjóti í hond at føra einherjarnar trygt til Valhøll.

Valkyrjan býr í hjartanum á øllum kvinnum; hon er tankin og viljin. Av kendum valkyrjum kunnu nevnast; Gunn, Hildur og Brynhild.

-áki-